### Heilsan á føðingardegi

# Johan M. Restorff 70 ár

**- 6. desember 2009**



Kendi havnarmaðurin, Jóhan M. Restorff, millum manna ofta nevndur »Jóhan á Hafnia«, er nú komin fram til »støvets ár«.

Onkur hevur sagt, at Johan man vera eins kendur uttanlands, tí arbeiðsøki hansara gav honum samband við ótrúliga nógv fólk, gestir á Hotel Hafnia, heimafólk og útlendingar og ivaleyst eigur hann nógvar kenningar í Føroyum og úti í heimi.

Frá 1. januar 1960 til 1. januar 2005, tá P/f Hotel Hafnia kom á aðrar hendur, hevði Johan tey flestu árini, saman við pápanum Christian Dahl-Restorff og beiggjanum M.C., leiðsluna á Hafnia. Eitt samstarv, sum var fyrimyndarligt. Seinastu tvey árini áðrenn eigaraskiftið, bleiv sonurin Martin undirstjóri, og varð hann pápanum ein góður, hollur samverka- og fakmaður, sum gav virkinum nýggjan íblástur.

Hafnia-menninir høvdu sum stavnhald at hava góða tænastu, góðsku, trivna, røkiskap og framhaldandi ætlanir um endurnýggjan og at hække støðið, bæði á hotel- og matstovuvirkseminum. Hetta kundi bert eydnast við hjálp frá dugnaligum, fakligum og áhugaðum starvsfólkum. Mong um landið alt minnast tíðina, tey stríddust á Hafnia.

Afturat hotelvirkseminum tók Johan m.a., saman við øðrum ábyrgd sum nevndarlimur í Føroya Ferðamannafelag, Gistinar húseigarafelagnum og Felagnum Tórshavn (Kunningarstovan).

Hann gjørdi sær stóran ómak, persónliga, at hava samskifti við ferðastovurnar í Danmark og vitjaði »Vestnorden-messurnar« í Føroyum, Danmark, Íslandi og Grønlandi, tey árini hann stóð við róðrið.

Joahn er eingin »reypari«, men stillisliga og brosandi hevur hann virkað og stríðst fyri tí, hann stóð fyri og hevði ábyrd av - innan og uttanfyri »diskin«. Lívsverk hansara var meira enn eitt arbeiði, heldur gjørdist tað ein liviháttur.

Johan er giftur Esther, ættað úr Fuglafirði, og hevur hon, saman við systrum hansara, Kirsten og Birgit, lagt orku sína í arbeiðið á Hafnia. Esther hevur gjøgnum árini verið honum ein tryggur stuðul, og børn og heim teirra avspeglar, at hon er ein góð mamma og konubrot, hóast heilsan av og á hevur bilað.

Esther og Johan giftust í Nykøbing F (San Valentines day) 14. februar 1959. Tá arbeiddu bæði á Hotel Baltic, Nykøbing F. Tey fingu fimm børn. Í 1959 fingu tey Christian, sum Harrin tók heim í 1965, bert 5 ára gamal. Í 1961 fingu tey ein son, sum bar hjartabrek, og bert livdi í tríggjar dagar. Í 1963 fingu tey Katrin. Hon er í dag avloysari á eldrastovni í Havn. Í 1967 fingu tey Jan. Hann er í dag kendur matstovuleiðari í Danmark, og í 1976 fingu tey Martin. Hann starvast í Eik-banka í Havn.

Hóast Esther og Johan hava verið á »fíggjarlógini« nøkur ár, ganga tey dagliga saman hond í hond, og sjónligt er, at tey eru góð og stuðla hvørjum øðrum í trúfesti og kærleika. Tey eru ríkað av 11 barnabørnum, sum tey elska og gleðast saman við.

Johan hevur frá barni av havt sína gongd í Ebenezer í Havn, og tá hann var umvendur í 1955, bleiv Ebenezer heimasamkoma hansara. Hann hevur í mong ár sungið í Ebenezer-kórinum, og enn í dag roynir hann seg í Manskórinum. Sum yngri kom hann í fyrstu nevndina fyri Kristnastovu á Amager, og enn í dag er hann partur av nevndini. Komandi árs-skifti hevur hann sagt seg úr nevndini, fyri at loyva yngri »kreftum« at sleppa framat.

Vit ynskja Johan hjartaliga tillukku á degnum við ynski um Harrans signing yvir hann, Esther og teirra kæru komandi tíð. Tey eru burturstødd 6. desember, men tankar okkara fylgja teimum, har tey ferðast.

**Vinir**

# Minningarorð um Ingrið Hammer

**f. 4.12.59 - d. 30.7.2009**



Dagurin í dag, 4 des. 2009, er ein dagur, ið leiðir tankarnar til tín, góða Ingrið, tí tú hevði fylt 50 ár, og nú bindiklubburin er samlaður, kennist tað sera tómligt, at tú ikki er ímillum okkum longur.

Tað er við sorgblídni, at vit í kvøld sita og fyrireika tann árliga jólahugnan við pakkaspæli, ið vit plaga at hava seinasta mánakvøld, áðrenn vit fara í jólafrí, og sum okkum dámar serstakliga væl, og var hetta ein partur av tí, sum tú plagdi at verða við til at fyrireika.

Ingrið var lívsglað og var altíð við til bæði gaman og álvara. Ingrið var altíð við upp á alt, var glað og positiv, stuttlig og hittinorðað sum fáur. Oftast var tað hon, sum fekk okkum avstað til ymisk tiltøk, so sum sjónleikir, konsertir, dansir og annað, og var tað bara hjá okkum at siga hvør skuldi við. Var tað okkurt sum Ingrið ikki tímdi, segði hon eisini frá.

Ingrið var áhugað í ymiskum, millum annað hondbólti, føroyskum dansi og aðrari føroyskari mentan.

Fleiri mánakvøld hava vit í bindiklubbanum roynt at sett orð á, fyri at skriva nakrar reglur, men hevur hettar verið sera trupult. Ikki tí at vit ikki hava funnið orð, men harafturímoti er nógv sum kundi verið skrivað.

Eitt, sum lá Ingrið tættast at hjarta, vóru genturnar og ommubørnini, og er tað ikki smávegis, sum hon hevur latið úr hondum til teirra.

Góði Jóhan Pauli, saknurin hjá tær og tykkum má verða stórur, og ikki minst nú tað stundar til jólar.

Við hesum fáu orðum, vilja vit lýsa frið yvir minnið um vinkonu okkara Ingrið

*Tey renna skjótt tey stuttu ár,*
*Til heim tú manst mær boða;*
*Og eftir vetur kemur vár*
*Við sól og fjallaroða*

**Bindiklubburin**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu og honum æru, tá ið kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara



**Tórleif Joensen**
* 25.11.1923 † 22.10 2009

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðini. Tøkk til Sverra Steinhólm, prest, fyri góð og troystarrík orð. Tøkk til kirkjutænarar, urguleikara, sangarar og kórið Cantabile fyri vakra sálmasangin.

Tøkk til heimasjúkrasystrarnar, ið vóru um hann hetta síðsta árið, og tøkk til starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum.

Hjartans tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og fyri hjálp og stuðul til jarðarferðina og ervið.

Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Takk til kirkjutænarar, sangarar, og gravara og til Hannis fyri vakran sang í kirkjuni.

**Jenny, Jónleif, Eyðbjørg og Kaj**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Óli Eiler Wolles, ættaður av Trøllanesi, búsitandi í Klaskvík,** andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin, 72 ára gamal. Farið verður úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Betesda sunnudagin kl. 13.30.

Kistan við **Ullu Aakjær, Tvøroyri,** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13 úr Tvøroyrar kirkju. Sungið verður úr sálmabókini.

**Tummas Joensen, ættaður úr Nólsoy, búsitandi í Havn**, andaðist í heimi sínum, týsdagin, 75 ára gamal. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum leygardagin kl. 16. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni sunnudagin kl. 13.

**Jákup Hansen, Klaksvík**, andaðist í Århus hósdagin 26. november, 55 ára gamal. Bønarhald verður í kapellinum á Århus Kommunehospital, Peder Sabroesgade 18A, fríggjadagin kl. 14.

**Olga Guttesen ættað úr Vági, búsitandi í Tórshavn**, andaðist í heiminum týsdagin, 74 ára gomul. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum leygardagin kl. 13.

**Jan Larsen, Ebeltoft í Danmark**, andaðist í heiminum sunnudagin, 46 ára gamal. Tey, ið vilja minnast Jan, kunnu lata børninum eina gávu. Konta í Eik, 155.663.2